# Eivør skal spæla á DMA-Folk

Danska fólkatónleikaheiðurslønahandanin Danish Music Awards - Folk í 2006 hevur føroyska luttøku. Ein av teimum, ið spælir er Eivør Pálsdóttir. Hettar skrivar Ugeavisen Tønder á síni heimasíðu.

Tiltakið verður hildið í Tønderhal 1 í Tønder og umframt Eivør er almannakunngjørt, at Lars Lilholt og Haugaard & Højrup Bigband spæla. Men onnur nøvn verða eisini á plakatini.

Skipað hevur verið fyri DMA - Folk síðan 2001, og tiltakið plagar altíð at vera væl vitja. Fyri Eivør er hetta eitt gott høvi at spæla fyri fólki úr fólkatónleikaídnaðinum.

Tiltakið verður hildið 11. mars og til ber at keypa atgongumerkið í forsølu frá 6. februar, á telefon +4574724610.

**- nud**


Umsorganararbeiði 2006



Sambært kunngerð nr. 160 frá 21. desember 2005 um stuðul til umsorganararbeiði er freistin at søkja um stuðul til umsorganararbeiði fyri 2006 tann 31. januar 2006.

Umsóknir skulu sendast til Almannastovuna, Smyrilsvegur 20, Postsmoga 3096, 110 Tórshavn.

Sí annars www.almannastovan.fo

KREA.FO · Tel. 67 80 80

almannastovan


## Samskip letur upp skrivstovu í Vigo, Spania

**SAMSKIP**
*tíðindaskriv*

Nú í nýggja árinum hevur Samskip latið upp skrivstovu í Vigo í Spaniu. Hetta er enn eitt stig í at styrkja tænastuna í flutningi av saltfiski og ørðrum vørum til og frá Spaniu. Hetta er samstundis enn eitt stig í framhaldi av keypinum av Kloosterboer í Føroyum, Noregi og Hollandi.

Stjóri í Spaniu verður hollendarin Ranier Wolsleger, sum er royndur í flutningsvinnuni.

Við hesari skrivstovni hevur Samskip 62 skrivstovur í 22 londum. 1.400 fólk starvast hjá Samskipum. Samlaði umsetningurin er umleið 5,5 mia. dkk.

Bústaðurin hjá Skrivstovuni í Spaniu er:
Samskip Spain S.A.
Punta Cubillon,
Officina 4, Planta 2
36320 Chapela-Redondela
(Pontevedra)
SPAIN

## Stúra fyri ágangi ímóti alistøðum

**Vandi er fyri, at víðgongd umhvørvisverndarfólk fara at gera seg inn á norskar alistøðir**

**NOREG**
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Um nátti8na tann 3. juni í fjør sluppu 100.000 laksar úr einari støð hjá norsku alifyritøkuni Volden Group, og kanningarnar avdúkaðu, at onkur hevði kvett einar 70 endar, so laksurin slapp út.

Løgreglan valdi tí at kanna tilburðin sum herverk. Kenneth Nilsen, kanningarleiðari, sigur við Aftenposten, at fleiri aðrar alistøðir hava mist laks, og nú verður kannað, um talan kanska eisini var um herverk har. Eitt nú kannar løgreglan ein tilburð á Bergen-leiðini, ein í Molde og ein við Helgelandsstrondina.

Aftenposten skrivar, at trygdartænastan hjá løgregluni hevur havt fund við norska havbúnaðarfelagið, og har hava alararnir fingið at vita, at alistøðirnar mugu metast sum møgulig álopsmál.

Tað er ikki bara í Noregi, at alistøðir verða mettar sum álopsmál. Í november mistu tríggjar alistøðir í Kanada laks, og løgreglan har kannar nú, um talan var um herverk. Í tí eina førinum vórðu ellivu ringar skornir upp, og umleið 100.000 laksar sluppu út.


STARVSLÝSING

Starvsfólkaleiðari

**Orsakað av at stovnurin ynskir fleiri skikkaðar umsøkjarar at velja ímillum til hetta starvið, søkja vit av nýggjum eftir starvsfólkaleiðara.**
**Av tí at verandi starvsfólkaleiðari ynskir at fara í annað starv á Landsverki verður við hesum søkt eftir nýggjum starvsfólkaleiðara at seta sum skjótast. Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt avbjóðandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.**

Arbeiðsuppgávur
Uppgávan er at leiða og standa fyri starvsfólkadeildini. Starvsfólkadeildin tekur sær av bæði starvsfólkarøkt og umsiting, herundir øllum tí, sum hevur við setanarviðurskifti at gera, menning av starvsfólki, skrivstovuumsiting, frítíð, arbeiðstíð og lønarviðurskiftum. Í hesum sambandi er tað eisini ein uppgáva at gera yvirskipaðar mannagongdir og reglur.

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir fólki við viðkomandi hægri útbúgving ella líknandi og helst við royndum innan leiðslu.

Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er førur fyri at eggja og ganga undan, er miðvísur, arbeiðir strukturerað og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:

Landsverk
Postboks 78,
110 Tórshavn

og skal vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 10. januar 2005. Merkið brævbjálvan "Starvsfólkaleiðari". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Oyvindi Brimnes, stjóra, á tel. 311 333 ella á ob@lv.fo

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land


## Viðurkenning til Sparikassin.fo

**Dynamic Systems hevur kosið hesa heimasíðuna at vera »Heimasíðan henda mánaðin«**

**HEIMASÍÐA**
*www.sparikassin.fo*

Heimasíðan, sum tú í hesi løtu lesur, er »Heimasíðan henda mánaðin« hjá stóru donsku CMS-fyritøkuni, Dynamic Systems.

Sparikassin fekk nýggja heimasíðu tann 1. november í 2005, og í januar 2006 er hon kosin »Heimasíðan henda mánaðin« hjá Dynamic Systems, ið er ein hin størsti danski framleiðarin av sonevndum Content Management-skipanum, ið stýra innihaldinum á heimasíðum. Skipanin nevnist DynamicWeb.

Tað er ein viðurkenning, at valið hesaferð er fallið á Sparikassin.fo, tí meira enn 1.400 DynamicWeb-heimasíður eru at velja millum.

Sparikassin hevur ment heimasíðuna á pallinum hjá Dynamic Systems í samstarvi við lýsingafyritøkuna ReproZ.

Við støði í Vevmátingarlistanum hjá Gallup Føroyum kann staðfestast, at Sparikassin.fo er ein av teimum sera væl vitjaðu heimasíðunum í landinum. Bert einstakar aðrar heimasíður í Føroyum eru betri vitjaðar.